

# Tvey frálandsskip við kei í Vági

**Jan Müller**

10.11.2015 - 22:52

Oljan.fo

Óvanliga nógv virksemi hevur verið í havnini í Vági í dag. Tvey frálandsskip hava ligið fyri teym umframt trolari, fóðurflaki og sandbátur.

Seismikkskipið Polar Empress og supplyskipið Sanco Sky hava seinnapartin ligið við djúphavnina og sokallaðu Smyrla-keiina. Við Polarfrost-keiina liggja trolarin Beinisvørð og fóðurflakin Arvanes, meðan sandbáturin Havstreym lá við kei inni á Oyrunum. Partrolarin Tórun K, sum í morgun lá við Smyrla-keiina, er nú fluttur vestur um vestastu keina, í Vági nevnd, Diasa-kei.

Tey bæði frálandsskipini koma helst at liggja í Vági í eina tíð aftrat, nú tey bíða eftir nýggjum arbeiðsuppgávum. Tey hava ligið við kei og á fjørðinum í einar tvær vikur.

Kelda: Vágur.fo

